**Poul Michelsen**
**Bjarni Kárason Petersen**
**løgtingsmenn**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 113/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um málráð**
(Styrkja støðuna hjá føroyska málinum við samskipara)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um málráð**
(Styrkja støðuna hjá føroyska málinum við samskipara)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 59 frá 15. mai 2012 um málráð, sum broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 13. juli 2017, verður § 5, stk. 5 orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Málráðið samskipar átøk, hvørs endamál er at styrkja støðuna hjá føroyskum í Føroyum.".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar:**
Uppskotið er partur av lógarpakka, sum Framsókn leggur fyri tingið, hvørs endamál er at styrkja støðuna hjá føroyska málinum sum tjóðarmál og brynja tað enn betur til framtíðina.

Í uppskoti til samtyktar mælir Framsókn til, at landsstýrið fyrireikar samskipað átøk at styrkja støðuna hjá føroyskum sum tjóðarmáli og at staðfesta, at landið hevur yvirskipaða ábyrgd av støðuni hjá føroyskum í Føroyum.
Sum tjóðarmál í Føroyum skal føroyskt verða nýtt á øllum økjum og í øllum høpum í føroyska samfelagnum, og landsstýrismaðurin eigur at seta í verk eina samskipaða virksiætlan fyri átøk, sum skulu styrkja støðuna hjá føroyskum. Verkætlan at tryggja, at føroyskt mál verður flutt inn í talgilda heimin, er eisini alneyðug at seta gongd á, og partar av samskipaðu átøkunum eiga at vera slík, sum tryggja, at føroyskt í framtíðini kann varðveita og styrkja sína støðu sum samfelagsberandi alment mál t.e. á øllum útbúgvingarstigum í Føroyum, innan mentanarøkini eins og umsiting og vinnulív.
Eisini eigur landsstýrismaðurin á serligan hátt at tryggja, at øll, sum búgva í Føroyum, hava góðar møguleikar at læra føroyskt væl og virðiliga, so tey kunnu luttaka í føroyska samfelagnum á fullgóðan hátt. Politiska skipanin eigur at virka aktivt fyri, at borgarar í Føroyum bæði nú og í framtíðini kunna nýta føroyskt mál í øllum samskifti við almennar stovnar og tænastur eins og við feløg og felagsskapir.
Tað, sum kann gera stóran mun, er at seta neyv mál og lyfta á fleiri økjum í senn og at eftirmeta átøk.

Við hesum lógaruppskotinum verður mælt til, at Málráðið fær ábyrgdina av at samskipa partar av átøkunum. Sambært lógini um málráð, hevur Málráðið til endamáls m.a. at røkja, menna og verja føroyska málið. Sostatt liggur uppgávan natúrliga hjá Málráðnum.
Til hetta endamál leggur Framsókn eisini fyri tingið uppskot um eykajáttan til at fíggja setan av einum samskipara.

Átøk, sum Framsókn serliga heldur skulu vera partur av eini samskipan við greiðum tíðar- og fíggjarkarmi, eru:

**Útbúgvinging og skúlaskapur**

***Lesiførleiki***. Arbeiðið í skúlunum við lesing og lesiførleika skal styrkjast og víðkast m.a. við støði í álitinum Føroyar Lesa.

***Føroyskt sum annaðmál.*** Tey, sum búgva í Føroyum, og sum hava annað móðurmál enn føroyskt, skulu hava bestu møguleikar at læra føroyskt. Verkætlanin *Føroyskt sum annaðmál* frá juli 2019 skal fylgjast.

***Skúlabókasøvn.*** Arbeiðsøkið hjá skúlabókasøvnum verður styrkt og skúlabókavørðir skulu fáa serútbúgving.

***Læraraútbúgving, pædagogútbúgving og miðnámslæraraútbúgving o.a.*** Styrktir málførleikar og dentur á kreativitet í málundirvísingini skulu birta undir enn betri læring og góðan hugburð til at læra og nýta føroyskt væl á øllum útbúgvingarstigum – frá vøggustovu til fróðskaparsetur.

***Eftirútbúgving til lærarar, pædagogar, kvøldskúlalærarar, miðnámsskúlalærarar o.o.***
Eftirútbúgvingar og skeið eiga at verða hildin fyri øllum sløgum av lærarum og undirvísarum

í Føroyum,  serliga í mun til fjølbroyttar førleikar at undirvísa í føroyskum sum móðurmál og í føroyskum sum annaðmál.

***Universitetslærarar og gransking.*** Undirvísing og gransking skal fara fram á føroyskum og um føroyskt. Fróðskaparsetrið, og serliga Føroyamálsdeildin, eigur at fáa karmar til at gerast ein altjóða miðdepil fyri gransking og undirvísing í føroyskum, norrønum og norðurlendskum máli og bókmentum - eisini við útlendskum studentum, lektarum og professarum - við forkunnugu staðseting Føroya og áhuganum fyri serstøkum, smáum málum sum savnandi megi.

***Undirvísingartilfar.*** Føroyskt undirvísingartilfar, til øll útbúgvingarstig í Føroyum, skal fáast til vegar - eisini til flestøll fakøki. Ferðin má økjast, so t.d. miðnám kann lesast á føroyskum, áðrenn long tíð er liðin.

***Undirvísing í føroyskum uttanlands.*** Serligur dentur skal leggjast á undirvísing fyri børn og ung. Samstarvsavtalur skulu gerast við viðkomandi lærustovnar í útvaldum londum, har skeið í føroyskum javnan skulu verða hildin.

## Mentan

***Bókaútgáva.*** Føroysk bókaútgáva og týðing skulu stimbrast munandi – við denti á korum rithøvunda.  Filmsrithøvundar og leikrithøvundar skulu eisini verða fevndir av hesum raðfestingum.

Barna- og ungdómsbókmentir skulu stuðlast meira. Ein barna-og ungdómsbókavirðisløn fyri føroyskar útgávur eigur at verða sett á stovn

Førleikamenning innan týðing eigur at verða boðin út sum skeið/partur av útbúgving regluliga

***Almenn bókasøvn.*** Dentur eigur at  leggjast á at menna tænasturnar til almenningin enn meira. Føroysk ljóðbókatænasta eigur at verða mundandi styrkt eftir longu gjørdum tilmælum.

***Filmur og sjónvarp.*** Ein serlig ætlan verður løgd fyri filmsframleiðslu á føroyskum máli.

***Kringvarp Føroya.*** KVF hevur avgerandi leiklut í avbjóðingunum og skal hava karmar til at stimbra føroyska málsamfelagið, m.a. við at teksta alt sjónvarpstilfar við føroyskum og at framleiða meira upprunaføroyskt tilfar á viðkomandi pallum - serliga til børn og ung.

***Privatir miðlar.*** Miðlastuðul til privatar miðlar skal endurskoðast, so hann eisini tænir endamálinum at menna og fjøltátta føroyskt mál í miðlunum.

## Tøknilig menning, atgongd og nýmenning

***Máltøkni.*** Framtíðin hjá føroyska málinum í talgilda heiminum skal tryggjast. Máltøknimótið fær uppgávuna at gera ítøkiligu verkætlanina fyri føroyska máltøkni.

***Orðasøvn og orðabøkur.*** Tað almenna skal tryggja, at orðasøvn av føroyskum og søvn av ljóðligum føroyskum tilfari verða ment og styrkt. Byrjast skal aftur at orðtaka og skal hetta gerast regluliga. Tað almenna skal tryggja eina viðkomandi atgongd til føroyskt máltifar fyri tey, sum arbeiða við at menna almannagagnligar tænastur á føroyskum.

Tað almenna skal styrkja Orðabókagrunnin, so arbeiðið at menna, røkja og ritstjórna Móðurmálsorðabókina og onnur savnindi, sum tað almenna hevur ábyrgdina av, kann halda fram og verða styrkt.

Landsstýrismaðurin eigur at tryggja, at orðabókagerð, sum er ein av hornasteinumum í grundalagnum undir føroyskum máli, eins og samskifti við onnur tungumál, altíð er á so høgum støði, at verandi orðabøkur fáa alla neyðuga málfrøðliga og tøknliga røkt eins og nýggjar verða framleiddar.

## Politikkir, umsiting og vinna

***Málráðið.*** Støðan og virkismøguleikarnir hjá Málráðnum mugu betrast, so neyðug arbeiðsorka er til allar teir týdningarmiklu málpolitisku tættir, sum Málráðið eigur at standa á odda fyri vegna føroyska málsamfelagið.

***Treytir um málnýtslu.*** Ávísar reglur verða gjørdar fyri myndugleikar og vinnu um at nýta føroyskt í øllum sínum virksemi, samskifti og arbeiðsamboðum.

***Orðfeingi.*** Arbeiðið við orðfeingi, nýyrðum, fakorðalistum og øðrum málrøktarvirksemi verður styrkt, so føroyskt støðugt mennist sum mál; eisini sum fakmál. Eisini eiga faklig málskeið at kunna verða boðin í einum málsamfelag, har so mong lesa sínar hægru útbúgvingar í útlondum.

***Málpolitikkur um føroyskt teknmál.*** Ein greiður málpolitikkur um føroyskt teknmál má gerast sum skjótast. Málráðið stendur fyri hesum arbeiði saman við øðrum serkønum á økinum.

***Føroyskur málpolitikkur.*** Føroyskur málpolitikkur skal dagførast fyri at spegla tær broytingartíðir fyri tungumál, sum vit uppliva. Málráðið stendur fyri hesum arbeiði og eggjar eisini vinnulívi, felagsskapum o.ø. at menna ein málpolitikk.

## Serligar viðmerkingar

### Til § 1
Málráðið fær til uppgávu at samskipa átøk, hvørs endamál er at styrkja støðuna hjá føroyskum í Føroyum. Til hetta endamál skal ein samskipari setast í ár, og í tí sambandi er eisini lagt fram eitt eykajáttanaruppskot.

### Til § 2
Gildiskoman er frá degnum eftir, at løgtingslógin er kunngjørd.

**Á Løgtingi, 6. mars 2020**

Poul Michelsen　　　　Bjarni Kárason Petersen